## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind og eitt skifti regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Týskvøldið møguliga regn. Hitin millum 13 og 17 stig.

Avfallið í september bleiv 198,7 mm móti miðal 139,2 mm
Miðalhitin bleiv 9,3 móti 9,2 í miðal

# Syngjandi børn í gullregni

**Leygardagin byrjar ein stuttlig og øðrvísi kapping í Sosialinum, har Kular Røtur og Trøllapætur eru í gávuhýri**

KAPPING

Hvat bjóðar omman børnum, og hevur abbin keypt sær nýggja blokkfloytu? Tað er ein av nógvu spurningunum, sum tey allarflestu í Føroyum ivaleyst vita svarið til. Og skuldi onkur ivast, so er loysnin at finna í nýggju sangbókini og gullfløguni, sum júst er komin út við Kulum Rótum.

Alt byrjaði fyri seks árum síðani, tá ið ein 23 ára gamal Fordur, sum eisini varð kallaður Bilurin hjá okkum, fór hostandi eftir føroysku tónleikabreytini. Tað var um sama mundið, at føroysku børnini kundu spegla sær í Veru, sum var sooo vell, ella droyma seg burtur við drekanum Puff ella vininum Nósa. Og tað komu fleiri sangir við Kulum Rótum og alsamt fleiri sungu við til fittu nýggju barnasangirnar. Har kundu øll vera við, tí í sangunum, sum komu úr Studio Pegasus, sluppu eisini ommur, abbar, mammar og pápar upp í part.

Næstu vikurnar og fram til seinast í november verður kappast her í blaðnum um ta snøggu sangbókina við Kulum Rótum og gull fløguna, sum júst er útkomin. Men afturat fløgum, filmum og bókum verður eisini ein stórur og spennandi høvuðsvinningur frá Atlantic Airways, har tann hepnasta kulasta rótin vinnur eina familjuferð uttanlands.

So lat ikki Sosialin mikudagar og leygardagar gleppa tær av hondum næstu vikurnar. Leygardagin 26. november verða Trøllapætur og Kular Røtur í Miðlahúsinum hjá Sosialinum - og tá verður tað spennandi at frætta, hvør sleppur at verða mitt í gullregninum.




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 19 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 20 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 21 |
| New York | -- |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1010 hPa. við Hetland fer í landnyrðing norðan og dýpist. Eitt annað, djúpt lágtrýst, 965 hPa. á 47N-39V fer spakuliga í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Norðsjónum fer norðureftir og mennist og vestan fyri hátrýstið rekur lýggj luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/10 kl. 06[00]– 13/10. 06[00]. Hitin í gjár: 5,7°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/10 kl. 06[00]– 13/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 77,4 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober Fyrra kvarter
14. oktober Mánin næstur jørðini
17. oktober Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. Okt. | 04.35 | 16.58 | 03.35 | 15.58 | 03.50 | 16.13 | 06.35 | 18.58 | 07.35 | 19.58 | 02.50 | 15.13 | 01.50 | 14.13 | 04.50 | 17.13 | 05.50 | 18.13 | 04.20 | 16.43 | 05.35 | 17.58 |
| 15. Okt. | 05.21 | 17.44 | 04.21 | 16.44 | 04.36 | 16.59 | 07.21 | 19.44 | 08.21 | 20.44 | 03.36 | 15.59 | 02.36 | 14.59 | 05.36 | 17.59 | 06.36 | 18.59 | 05.06 | 17.29 | 06.21 | 18.44 |
| 16. Okt. | 06.08 | 18.30 | 05.08 | 17.30 | 05.23 | 17.45 | 08.08 | 20.30 | 09.08 | 21.30 | 04.23 | 16.45 | 03.23 | 15.45 | 06.23 | 18.45 | 07.23 | 19.45 | 05.53 | 18.15 | 07.08 | 19.30 |
| 17. Okt. | 06.52 | 19.16 | 05.52 | 18.16 | 06.07 | 18.31 | 08.52 | 21.16 | 09.52 | 22.16 | 05.07 | 17.31 | 04.07 | 16.31 | 07.07 | 19.31 | 08.07 | 20.31 | 06.37 | 19.01 | 07.52 | 20.16 |
| 18. Okt. | 07.41 | 20.05 | 06.41 | 19.05 | 06.56 | 19.20 | 09.41 | 22.05 | 10.41 | 23.05 | 05.56 | 18.20 | 04.56 | 17.20 | 07.56 | 20.20 | 08.56 | 21.20 | 07.26 | 19.50 | 08.41 | 21.05 |

5 707265 100050 >